


P/F Ivan Johansen Bilar, Dinitrol:

# Salt og væta fara illa við bilunum

**Bilar, sum ikki eru væl rustvardir, hava ongan møguleika at standa ímóti teimum avbjóðingum sum koma gjøgnum veturin við salti og vætu, sigur Kaj Boetius, sum stendur fyri Dinitrol rustviðgerini hjá Ivan Johansen Bilum**



*Rustviðgerð er í stóran mun ein spurningur um álit, sigur Kaj Boetius, sum stendur fyri rustviðgerðini hjá Ivan Johansen Bilum. Kaj hevur luttikið á skeiðum fyri sproytuoperatørar hjá Teknologisk Institut í Danmark og fingið besta karakter fyri sítt arbeiði*

Nú veturin stundar til, er tað av alstórum týdningi, at bilarnir eru væl vardir.

Livitíðin hjá einum bili er sum oftast treytað av hvussu væl rustviðgjørdur hann er, sigur Kaj Boetius, sum stendur fyri rustviðgerini hjá Ivan Johansen Bilum. Hetta verður eisini váttað av bæði FDM og Dansk Teknologisk Institut (DTI), sum ráða bileigarum til at rustviðgerða sínar bilar. Og tá hetta verður tilmælt í Danmark, er sannlíkt at tað er enn størri orsøk at gera tað sama í Føroyum við einum veðurlagi, sum er harðari hvat rustkorrisión viðvíkur enn t.d. í Danmark.

Vit uppliva, at rustur sæst á ymiskum lutum undir botninum á lutfalsliga nýggjum bilum, sigur Kaj Boetius.

Ivan Johansen Bilar var fyrsta fyritøka, sum tók sær av at rustviðgera bilar í Føroyum tíðliga í sjeytiárunum. Fyritøkan hevur gingið á odda innan hetta økið øll árini við dagførdum amboðum og nútímans hølisviðurskiftum til rustviðgerð.

Dinitrol rustviðgerðin er góðkend av Teknologisk Institut og verður tilmæld av FDM.

Til hvørt einstakt bilmodell eru kort við nágreiniligum upplýsingum um konstruktiónina á bilinum, og hvørji amboð ið skulu brúkast. Alt verður gjørt eftir

**»Vit uppliva, at rustur sæst á ymiskum lutum undir botninum á lutfalsliga nýggjum bilum«**

forskriftunum.

Bilar, sum eru rustviðgjørdir hjá Ivan Johansen Bilum, verða á hvørjum ári kannaðir av DTI. Hetta verður gjørt soleiðis, at DTI velur nakrar tilvildarligar bilar út til eftirkanningar. Og á hvørjum ári, hava skoðsmálini verið góð. Tað er DTI sum stendur fyri hesum eftirkanningunum, ið kallast VKO-R (Værksteds Kontrol Ordning vedrørende Rustbeskyttelse).

Tað eru langt frá allir nýggir bilar, sum eru nóg væl rustviðgjørdir, tá teir koma til landið. Og tað sama ger seg galdandi, tá fólk keypa brúktan bil. Tí er tað ein góð íløga fyri eigaran at fáa bilin rustviðgjørdan ongantíð ov skjótt, sigur Kaj Boetius, sum leggur afturat, at best er at bilarnir eisini verða eftirviðgjørdir annað hvørt ár. Tað er sjáldan ov seint, men ongantíð ov tíðliga at fáa bilin rustviðgjørdan. mg